## Skúlabørn sendu 32 bókaummæli

Í summar hevur barnabókasavnið í Havn havt eina kapping, har øll skúlabørn kundu senda ummæli av bókum, sum tey hava lisið. Nú er kappingin av, og 32 ummæli komu inn. Har eru bæði stutt og long ummæli, og sum vit ynsktu, eru bæði ummæli, har bókin verður róst og viðmælt, og ummæli har verður sagt frá, hvussu keðilig onkur bók hevur verið at lisið. -Vit hava kastað lut millum øll ummælini og funnið tríggjar vinnarar. Hesar tríggjar hava vunnið hvør sítt gávukort á 300 kr. í Rit&Rák í SMS: Sigrid, 11 ár, Tórshavn. Rakul Hansen, 13 ár, Tórshavn. Rannvá Egholm, 12 ár, Velbastaður. Øll ummælini kunnu síggjast á http://leita.bbs.fo/bokaummali

## ÍSB skipar fyri barnadegi

Leygardagin 30. august skipar Ítróttasamband fyri Brekað fyri sokallaðum Barnadegi í ítróttahøllini á Hálsi í Havn. Talan er um tiltak, har ið endamálið er at savna so nógv sum møguligt av børnum og ungum, sum bera okkurt breki. Hugsað verður bæði um tey, sum í løtuni eru virkin innan ÍSB, men eisini, og ikki minst, tey, sum ikki taka lut í nøkrum ítrótti. Í Føroyum eru fleiri børn og ung, sum eru brekað og sum kundu fingið enn meira burturúr tilveruni, um tey vóru virkin á ítróttaøkinum, har ið fleiri møguleikar eru. Á Barnadegnum fara vit at kunna um hesar møguleikar, og annars sleppa øll at royna seg í ymsum spølum. Tiltakið skal vera eitt stuttligt og hugnaligt upplivilsi. Ein drekkamuður verður eisini at fáa.Vit heita á øll foreldur, ið vara av børnum við breki um at koma við til Barnadagin saman við børnunum. Tiltakið byrjar kl. 11 og hildið verður fram til kl. 14. Neyðugt er at boða frá luttøku. Tað kann gerast á tlf. 317579 / 216760 ella við telduposti til isb@post.olivant.fo

# Føroysk fyritøka vekir

**Við software skipanum sum gera tað møguligt at stýra og samskipa alla vitan um komponentar og starvsfólk, hevur ein føroysk fyritøka í Keypmannahavn funnið sína heilt serstøku rók í altjóða offshore vinnuni**




VINNA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Í einari vinnu, sum ikki kennir landamørk, og har allar fyritøkur fevna um fleiri lond, ber tað kanska ikki til at siga, at ein fyritøka er føroysk. Men vit gera tað kortini. Vit loyva okkum at kalla fyritøkuna, Keel Solution, fyri eina føroyska fyritøku.

Við høvuðssæti í Keypmannahavn, menningardeild í Ukreina og starvsfólkum ferðandi runt allan heim, hava føroyingarnir Christian Didriksen Grahn, Heini Mikkelsen og Ruben Mikkelsen ment Keel Solutions sum ein heilt serligan nissjuveitara av KT loysnum fyri offshore vinnuna.

Heini Mikkelsen hevur eina fortíð í oljuvinnuni, og Christian D. Grahn arbeiddi frammanundan í KT ráðgevingarfyritøku, sum gjørdi SAP loysnir. Teir sóu ein tørv á einari skipan, sum kann samla alla vitanina, sum liggur í oljufyritøkunum, og oljufelagið, Maersk sá beinanvegin so stórar møguleikar í hesari ætlan, at teir ynsktu at fíggja alt menningararbeiðið.

Danska oljufelagið, Maersk, er í dag høvuðskundi hjá fyritøkuni, men føroyingarnir eiga fyritøkuna við einari liðugtmentari skipan við stórum sølumøguleikum. Fyritøkan er í menning, og ein skrivstova í Klaksvík, ein í Singapore og eitt venjingarstað í Ukreina eru millum annað í umbúnað. Og hendan mánaðan luttekur Keel Solution í stóru oljuráðstevnuni í Stavanger.

### Øll vitan í eina skipan

Virksemi hjá stórum oljufeløgum er komplekst og umfatandi. Og tí hevur tað stóran týdning – ikki minst fyri effektivitetin – at vitanin í ymisku liðunum verður gagnnýtt á besta hátt.

- Boripallar verða bygdir við meira enn 60.000 ymiskum komponentum. Starvsfólkini, sum byggja pallin eru ikki tey somu, sum reka hann, og hinumegin knøttin er ein annar sama slag pallur við heilt øðrum starvsfólkum, greiðir marknaðarleiðarin í Keel Solution, Dánial Hoydal frá.

Keel Solution hevur ment eina skipan, sum ger tað møguligt at fylgja tí einstaka komponentinum frá vøggu til grøv.

Hvør lutur hevu sítt samleikamerki, og tí ber til at fylgja lutinum frá tí hann verður brúktur fyrstu ferð til hann verður útskiftur. Hetta ger at vitanin ikki rímur við tí einstaka starvsfólkinum, men verður verandi í skipanini.

- Vitanin er longu til, men liggur ofta í ymiskum deildum í fyritøkuni ella hjá tí einstaka starvsfólkinum, og tað er sjálvandi ikki nøktandi í risastórum oljufyritøkum, sigurmarknaðarleiðarin hjá Keel Solution.

Føroyska fyritøkan hevur eisini ment eina líknandi skipan fyri starvsfólkaførleikar.

- Tað sum fær fólk at siga upp er ofta, at tey ikki kenna seg nóg væl brúktan, at tey ikki sleppa at brúka teirra førleikar. Og mangan missa stórar fyritøkur starvsfólk, tí tey heilt einfalt ikki vistu hvørjar førleikar tey høvdu, greiðir Dánial Hoydal frá.

Skipanin hjá Keel Solution skrásetir allar førleikar, útbúgvingar og trygdarskeið, soleiðis at HR deildin og leiðslan betur kann planleggja arbeiðið og nýta førleikarnar sum liggja í felagnum heldur enn keypa dýrar konsulentar uttanifrá. Alt hetta hevur týdning fyri oljuvinnuna í framtíðini, tí stórur tørvur er á kvalifiseraðari arbeiðsmegi.

### Løtt at brúka

Ein sporførisskipan ger arbeiðið meira effektivt og gevur oljufeløgum møguleika at spara nógvar pengar. Men fyri at hon skal virka krevst, at alt verður skrásett. Hetta hendir sjálvandi ikki av sær sjálvum, og trupulleikin við vitanarsavning er mangan, at skrásetingararbeiðið er ov innviklað til vanliga brúkaran.

Men skipanin hjá Keel Solutions er rættiliga brúkaravinarlig. Til dømis hevur skipanin eina bloggskipan, har tann einstaki ingeniørurin, sum sær ein feil í einari pumpu á boripallinum, ikki noyðist at fara inn í ein torføran databasa at skráseta feilin, men kann skriva vitanina inn á ein einfaldan blogg, sum øll duga at brúka.

- Bloggurin er lummabókin hjá starvsfólkinum. Í staðin fyri at skriva tað niður í eina bók, sum bara ligg-